# Dansur

## í Glæmuni í Kvívík

Leygardagin 20. oktober 2007 verður seyðasýning á Skælingi og í hesum sambandi verður dansur í Glæmuni í Kvívík.

Orkestrið »BRIM« úr Vestmanna spælir.
Kostnaður kr. 100,00



Komið til Kvívíkar og havið eitt gott og hugnaligt kvøld saman við okkum!

Bygdarfelagið Glæman

# Setursskrivari

Fyrisitingin á Fróðskaparsetrinum sóknast eftir setursskrivara í eitt tíðaravmarkað starv at seta frá 1. desember ella skjótast til ber til 30. november 2008.

Setursskrivarin hevur í samstarvi við rektaran leiðsluna av fyrisiting og skrivstovu setursins. Arbeiðið fevnir m.a. um fíggjarmál, starvsfólkamál, hølisviðurskifti, menning og rakstur av fyrisitingarligum KT-skipanum, setursráðsfundir, samskifti við deildirnar og við miðfyrisitingina, samstarv við stovnar í Føroyum og í grannalondunum. Setursskrivarin hevur 4 starvsfólk á skrivstovu síni.

Landsstýrismaðurin arbeiðir í løtuni við lóg um at leggja saman Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya, Føroya Læraraskúla og Fróðskaparsetur Føroya til ein stovn. Setursskrivarin kemur at hava ein týðandi leiklut í samskipanini av hesi áhugaverdu samanlegging.

Vit ímynda okkum, at tú hevur relevanta akademiska útbúgving, og royndir við leiðslu og fíggjarstýring. Tað er ein stórur fyrimunur, um tú hevur hollan kunnleika til ymsar KT skipanir, eins og tað er ein fyrimunur, um tú hugsar kreativt og nýskapandi.

Starvið er skipað sum deildarleiðarastarv. Løn og setanartreytir eru sambært avtalu millum Lønardeildina og avvarðandi yrkisfelag.

Meira fæst at vita um starvið og arbeiðsplássið frá Anniku Sølvará á tel. 552504 ella á ***annikas@setur.fo***

Umsókn við viðkomandi skjølum, ið skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 26. oktober, skulu sendast til:

Fróðskaparsetur Føroya
Setursskrivstovan
J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · FO-100 Tórshavn
***ella til annikas@setur.fo***

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

TEAM85

Starvslýsing

Heimatænastan

## Sjúkrarøktarfrøðingur í Heimatænastuni í Vágum/Norðstreymi

Søkt verður eftir sjúkrarøktarfrøðingi at arbeiða 28 tímar um vikuna í skiftandi vaktum at byrja 1. desember 2007. Arbeiðið umfatar røkt og umsorgan til heimabúgvandi borgarar og til búfólkini á Eldrasambýlinum. Arbeitt verður í tøttum samstarvi við aðrar fakbólkar innan skipanina.

**Krøv til umsøkjaran:**
- Prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- Fakligan áhuga innan primera økið
- Góð samstarvsevni og dugir væl at samskifta
- Er fleksibul
- Ynskiligt er, at umsøkjarin hevur teldukunnleika á brúkarastøði

**Setanarviðurskifti:**
Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar. Setanarøkið er Nærverkið og tænastustaðurin er í løtuni Heimatænastan við útgangsstøði frá Vestmanna .

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til økisleiðaran á tlf. 333249/282249.

Umsókn saman við prógvi, og møguligum viðmælum verður at senda til:

Heimatænastan Vágar/Norðstreymoy
Stílað: Sonja Klein, økisleiðari
370 Miðvágur

**Umsóknarfreist: 26. Oktober 2007**

## Avloysari fyri sjúkrarøktarfrøðing í farloyvi, Heimatænastan Eysturoy

Søkt verður eftir avloysara fyri sjúkrarøktarfrøðing í farloyvi at byrja beinanvegin ella skjótast gjørligt.

Arbeiðstíðin er 32 tímar um vikuna í skiftandi vaktum, tó mest dagvaktum.

Arbeiðið umfatar sjúkrarøkt og vegleiðing til borgarar, sum búgva heima ella á eldrasambýli.

Arbeiðsøkið er Øki 3, sum umfatar allar kommunur í Eysturoynni uttan Eiðis- og Sunda kommunu

**Førleiki:**
- Prógv sum sjúkrarøktarfrøðingur
- Fakligan áhuga fyri primera økinum
- Fleksibilitetur
- Góð samstarvs- og samskiftisevni

**Vit kunnu bjóða:**
- Eitt avbjóðandi, fjølbroytt og sjálvstøðugt starv í tøttum samstarvi við aðrar fakbólkar
- Innleiðslu
- Tænastubil

**Setanartreytir:**
Setanartíðarskeið: Beinanvegin ella skjótast gjørligt og til 29.02.08.
Lønin verður ásett sambært sáttmála við viðkomandi yrkisfelag.

Setanarøkið er Nærverkið, og tænastustaðurin er Heimatænastan í Eysturoynni.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Økisskrivstovuna á tlf. Nr. 449249.

**Umsókn:**
Send eina umsókn við prógvi við meira. til:

Heimatænastan Eysturoy
Økisskrivstovan, Heilsumiðstøðin
Postboks 47
FO 610 Saltangará

**Umsóknarfreist: 26. oktober 2007.**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 30 40 20 · Faks 30 40 10 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

Lesið Sosialin

## HÚS Á GARÐAVEGNUM

Um hóskandi boð fæst, eru eini hús á Garðavegnum í Klaksvík til sølu.

Húsini eru 96 m² í 2 hæddum.

Húsini eru nýumvæld innan í 2005-2006 við t.d. nýggjum køki, bað og gólvum

**Tlf. 210689**